# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
NIELS PETERSEN
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ioana komin í gongd

**Mikukvøldið, tá landsdystir í fótbólti herjaðu runt um í Europa, spældu Kyndla liðini hjá kvinnum og monnum móti VÍF, og Vestmenningar komu, sóu og sigraðu**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Kvinnurnar hjá VÍF vóru eisini á vitjan í Havn mikukvøldið, og har var talan um avsmurning.

### Saknur í Jóruni

Óhepna Kyndlaliðið, ið hevur mist Jóruna Ludvík gjøgnum skaða, tykist hava trupult at finna fótafesti, uttan Jóruna á liðnum, og so hava tær eitt heilt ungt lið at ráða yvir, so tað er trupult hjá teimum.

Og trupult var tað eisini mikudagin, tá eitt áður, nógv oftari nevnt navn, aftur verður nevnt við øktum títtleika. Ioana Rapa kundi við sínum 10 fulltreffarum staðfesta stórsigurin til gulu vestmenningarnar, ið endaðu við at vinna heili 16-30, eftir hálvleiksstøðuna 5-13.



*Ioana Rapa, sum í mong ár hevur verið ein av berandi kreftunum á VÍF liðnum. Hon fekk rættuliga hol á málskjótingina móti Kyndli mikukvøldið, tá hon hamraði 10 bóltar í netmeskurnar*

### FAKTA

**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Tordis Tróndarson 3, Barbara Egilstrøð 3 (1), Mia Káradóttir 3, Súsanna Petersen 2, Hildur Høghamar 1, Kari Ann Petersen 1, Ronja Mikkelsen 1, Jacklin Durhuus 1, Ása Apol 1.
**VÍF:** Ioana Rapa 10 (3), Liljan Djurhuus 6, Fríða Marjunardóttir 4, Heidi Joensen 3, Torgunn H. Johansen 3, Finngerð Jensen 2, Bára Karldóttir 1, Katrin Christophersen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, VÍF 3
**Útvísingar:** Kyndil 5, VÍF 0
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andrias F. Hansen

### FAKTA

**Dystarskrá fyri vikuskiftið:**
Atlantic Airways kappingin (Menn)

| Dystur: | Dato: | Kl: | Stað: |
|---|---|---|---|
| H71-Neistin | 5/11 | 16:00 | Hoyvíkshøllin |
| KÍF-StÍF | 25/11 | 16:00 | Ítróttarhøllin í Kollafirði |

Í Sunset kappinginini eru ongir dystir, hetta vikuskiftið, orsakað av landsdystunum, ið føroyska kvinnulandsliðið skal spæla móti íslendska U-20 liðnum. Fult umfar í Sunset kappingini verður spælt aftur 1. desember.

# Koyrur ikki hjá Kyndli

**Mikukvøldið spældu Kyndlamenn móti VÍF á heimavølli, og keðiliga gongdin í seinastuni, tykist halda áfram**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Mikukvøldið fingu teir grønu úr Havn, vitjan av vestmenningum, og har gjørdu teir gulu bar tog vunnu at endanum við fimm málum.

### Gult vann á grønum

Vestmenningar løgdu bragdligari fyri og vunnu sær leiðsluna, og hana hildu teir restina av dystinum. Tá bríkslað var til hálvleiks var støðan 11-18 til VÍF, og Serliga Agnar Joensen var tendraður. Hann hamraði heili seks mál í netið, tann fyrsta hálva tíman, og í hølunum á honum vóru tveir Kyndlamenn, ið báðir skoraðu fýra mál hvør, í fyrra hálvleiki.

### Intensitetur

Heili 10 ferðir varð bríkslað fyri brotskasti, og tað gevur ábendingar um at spælið, til tíðir, var hart. Serliga heimaliðið fekk ágóðan av teimum mongu brotskøstunum, tí sjey av brotskøstunum vórðu tillutaði Kyndli. Kyndlamenn høvdu kanska ynskt at teir fingu fleiri tillutaði, tí øll sjey køstini hjá teimum grønu endaðu í málinum. So okkurt hava teir gjørt rætt, tá teir hava studera Eli Müller, málverjan hjá vestmenningum.

### Neistin fyri framman

Næsti dystur hjá óhepnu Kyndlamonnunum verður klassiski kampurin um Havnina, tá teir grønu taka móti teimum bláu. Hetta skuldi verið eitt gott hvøi hjá Kyndli at vent keðiligu gongdini, og fyri samstundis at skapt enn størri spenning í oddinum, har StÍF andar Neistan tungt í nakkan.

### FAKTA

**Kyndil-VÍF 26-31 (11-18)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Hjalti Jacobsen 9, Hans Á. D. Christiansen 6 (4), Finnur Hansson 3 (2), Rani Ellingsgaard 2, Ken Zachariasen 1 (1), Regin Fossaberg 1, Hans A. Thomsen 1, Bárður Johannesen 1.
**VÍF:** Áki Olsen 8 (1), Agnar Joensen 7 (1), Niels Andreasen 5, Jákup S. Andreasen 3, Bjarti Hansen 2, Rúni Joensen 2, Rói Lamhauge 1, John M. Andreasen 1, Fríðbjørn Seloy 1, Daniel Rapa 1.
**Brotskøst:** Kyndil 7, VÍF 3
**Útvísingar:** Kyndil 1, VÍF 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andrias F. Hansen

### FAKTA

**Støðurnar í Atlantic Airways og Sunset kappingunum hjá ávíkavist monnum og kvinnum:**

**Atlantic Airways kappingin:**

| | D | V-J-T | Mál+/- | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 7 | 5-1-1 | 210-189 | 21 | 11 |
| 2 StÍF | 7 | 5-0-2 | 202-168 | 34 | 10 |
| 3 H71 | 7 | 4-0-3 | 183-181 | 2 | 8 |
| 4 VÍF | 8 | 3-1-4 | 225-230 - | 5 | 7 |
| 5 Kyndil | 8 | 3-0-5 | 198-224 | -26 | 6 |
| 6 KÍF | 7 | 1-0-6 | 169-195 | -26 | 2 |

**Sunset kappingin:**

| | D | V-J-T | Mál+/- | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 6-0-1 | 212-154 | 58 | 12 |
| 2 Neistin | 6 | 5-0-1 | 160-127 | 33 | 10 |
| 3 VB | 6 | 3-1-2 | 128-127 | 1 | 7 |
| 4 Kyndil | 8 | 2-1-5 | 177-208 | -31 | 5 |
| 5 VÍF | 8 | 2-1-5 | 164-195 | -31 | 5 |
| 6 StÍF | 7 | 1-1-5 | 152-182 | -30 | 3 |